**UTTAN ÚR HEIMI**

## Jugoslavia avtikið

Jugoslavia verður nú endaliga strikað av evropeiska kortinum. Tað hendir, eftir at tjóðartingið týsdagin samtykti at upploysa Jugoslavia, sum ístaðin fyri verður partur av samveldinum Jugoslavia Montenegro.

Til hetta kravdist nýggj grundlóg, og tá tingið atkvøddi um hana, atkvøddu 84 tinglimir fyri og 31 ímóti. Samstundis varð avgjørt at velja eitt nýtt tjóðarting innan fjúrtan dagar. Har verða 91 umboð úr Jugoslavia og 35 úr Montenegro. Tingið skal so velja nýggjan forseta, sum skal sita í fýra ár.

Beograd verður høvuðsstaður í Jugoslavia Montenegro, men hægstirættur skal hava sæti í Podgorica. Ein felags herur skal eisini skipast.

## Beinleiðis tingingar

Amerikanska stjórnin ætlar sær at tosa beinleiðis við myndugleikarnar í Norðurkorea fyri at loysa kreppuna um ta norðurkoreansku kjarnorkuverkætlanina.

Amerikanski varauttanríkisráðharrin, Richard Armitage, segði í einari hoyring í kongressini, at USA fer at tingast við Norðurkorea, og at Kina, Russland, Suðurkorea og Japan verða eisini við í tingingunum.

Norðurkorea avdúkaði í heyst, at landið hevði arbeitt við einari kjarnorkuverkætlan, sjálvt um landið í 1994 bant seg til at steðga verkætlanini. Síðani hetta kom fram, hava viðurskiftini millum Norðurkorea øðrumegin og USA og Suðurkorea hinumegin verið spent, og orðalagið hevur verið ógvuliga hvast.

## Russar flúgva

Vanlukkan við amerikansku rúmdarferjuni "Columbia" hevur ikki ávirkað russisku rúmdarverkætlanina, og nú hevur eitt russiskt rúmdarskip verið úti á støðini ISS við mati og vatni til teir tríggjar rúmdarmenninar, sum eru á støðini.

Rúmdarskipið, sum eitur "Progress", hevði eisini ymsa tekniska útgerð til teir tríggjar menninar, tveir amerikanarar og ein russara. "Progess" varð skotið út í rúmdina sunnudagin, dagin eftir vanlukkuna við "Columbiu".

Amerikanska rúmdarumsitingin hevur fyribils steðgað øllum sínum verkætlanum, og tí er ógreitt, nær teir tríggir rúmdarmenninir í ISS sleppa niður aftur á Jørðina. Menninir hava verið á støðini síðani í november, og ætlanin var, at rúmdarferjan "Atlantis" skuldi fara eftir teimum í næsta mánað.

## Steina ikki longur

Ovastin fyri dómsvaldinum í Iran sigur, at landsins dómstólar hava fingið boð um at gevast við at døma fólk til deyða við steining.

Tíðindini vórðu borin í iranska sjónvarpinum í gjár, og har varð sagt, at ovastin fyri dómsvaldinum hevði kunnað uttanríkiskommiserin hjá ES, Chris Patten, um avgerðina. Patten var fyrr í vikuni á vitjan í Teheran, men sjálvur sigur hann, at tað bar ikki til at fáa at vita, um avgerðin at steðga deyðarevsing við steining er fyribils, ella um hon verður varandi.

Chris Patten fekk heldur ikki at vita, hvør revsing kemur ístaðin fyri steining.

# Al-Qaeda hóttir við nýggjum 11. september

**Amerikanska stjórnin varð í síðstu viku kunnað um, at yvirgangsfelagsskapurin al-Qaeda fyrireikar eina atsókn, sum verður líka ógvuslig sum tann, ið var tann 11. september í 2001.**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen:*



*Júst sum amerikanarar umhugsa, hvat teir skulu byggja á Ground Zero, har World Trade Center stóð, eru ábandingar komnar um, at al-Qaeda fyrireikar eina líka ógvusliga atsókn sum tann 11. september í 2001.*

Sambært blaðnum Washington Times vóru yvirgangsmenninir komnir væl áleiðis við sínum fyrireikingum, men amerikanskar fregnartænastukeldur upplýsa fyri blaðnum, at tær nógvu handtøkurnar seinastu mánaðarnar hava darvað fyrireikingunum.

Amerikanska fregnartænastan sigst hava fingið fatur á samskifti ímillum limir í al-Qaeda, og sagt verður, at hetta samskiftið boðar ikki frá góðum. Sambært Washington Times benda upplýsingarnar á, at fleiri av bólkunum í al-Qaeda eru við at gerast líka sterkir og væl skipaðir, sum teir vóru undan atsóknini í USA tann 11. september í 2001.

Í síðstu viku vórðu Hvítu Húsini kunnað um upplýsingarnar, sum fregnartænastan hevði fingið fatur á.

- Hetta verður eitt ógvusligt álop, sigur ein kelda við Washington Times. Keldan vil tó ikki siga, hvørji mál talan er um, ella hvar yvirgangsmenninir ætla at søkja at.

Í desember metti ovastin fyri CIA, George Tenet, at ein triðingur av leiðarunum í al-Qaeda vóru tiknir ella deyðir, og í september í fjør tók pakistanska løgreglan Ramzi bin al-Shibh, sum verður hildin at vera ein av høvuðsmonnunum aftan fyri atsóknina at World Trade Center og Pentagon. Men nógv bendir á, at al-Qaeda er framvegis førur fyri at skipa fyri atsóknum.

George W. Bush, forseti hevur fleiri ferðir sagt seg bera ótta fyri, at yvirgangsfelagsskapir sum al-Qaeda skulu fáa fatur á biologiskum ella kemiskum vápnum. Forsetin vil vera við, at Irak samstarvar við al-Qaeda, og júst hetta er ein orsøkin til, at forsetin umhugsar at leypa á Irak fyri at fáa stýrið hjá Saddam Hussein, forseta frá.

### Fleiri ætlanir

Hóast fleiri av leiðarunum í al-Qaeda sigast vera tiknir ella deyðir, viðganga amerikanarar, at teir hava framvegis ikki funnið teir tríggjar ovastu leiðararnar í felagsskapinum, Osama bin Laden, Ayman al-Zawahiri og Khalid Sheik Mohammad.

Í desember sendi arabiska sjónvarpsstøðin Al-Jazeera eina bandupptøku, og serfrøðingar vilja vera við, at tað var bin Laden, sum tosaði á bandinum. Har hótti hann sum so mangan fyrr við álopum á USA og amerikanarar.

-Bin Laden er altíð trý stig frammanfyri, og hann hevur altíð fleiri ætlanir, ikki bara eina. Vit halda, at summar av hesum ætlanum skulu fremjast í verki, sigur ein ónevnd kelda við Washington Times.

# Hansara egnu atkvøddu ímóti Blair

**Bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, var fyri einum av sínum sjáldsomu ósigrum í Undirhúsinum fyrradagin, tá meirilutin samtykti, at í framtíðini skulu lordarnir í Yvirhúsinum veljast.**

BRETLAND
*Árni Joensen:*

Í framtíðini sleppa bara 20 prosent av lordunum í bretska Yvirhúsinum at sita har, tí teir eru tilnevndir, ella tí teir hava arvað sætið. Allir hinir noyðast at stilla upp til val, og skulu teir varðveita sætið, noyðast teir at vinna sær tekki veljaranna.

Sjálvur hevði Tony Blair, forsætisráðharri, skotið upp, at teir politisku flokkarnir skuldu velja lordarnar, og síðani skuldi hann sjálvur biðja drotningina tilnevna teir. Blair helt, at hetta var tann betra loysnin. Hann segði seg stúra fyri, at skulu lordarnir veljast, fer tað at bera í sær eina kapping millum Undirhúsið og Yvirhúsið. Higartil hava lordarnir í Yvirhúsinum bara tikið støðu til tær lógir, sum Undirhúsið hevur samtykt.

Undan atkvøðugreiðsluni var greitt, at hugskotið hjá Blair fór at møta harðari mótstøðu. Serliga vinstravongurin í Arbeiðaraflokkinum tók undir við, at lordarnir skulu veljast, og hóast forsætisráðharrin royndi at sannføra sínar floksfelagar um tað øvugta, eydnaðist tað ikki. Mótstøðumenn hansara mintu hann á, at undir valstríðnum í 1994 hevði Balir fleiri ferðir sagt, at í framtíðini skuldu lordarnir veljast, og at hann átti at halda orð.

Í London verður hildið, at í hvussu er fimm av ráðharrunum hjá Blair atkvøddu ímóti honum í hesum málinum. Tað gjørdi Robin Cook, sum er formaður í tingbólkinum hjá Arbeiðaraflokkinum, eisini, og fleiri aðrir leiðandi flokslimir gjørdu tað sama.

# Bondevik settur upp á pláss

Í seinastuni hevur norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, fleiri ferðir sagt, at Noreg fer ikki at kenna seg bundið av einari nýggjari ST-samtykt um Irak, men hesa støðu vildi uttanríkispolitkska nevndin hjá Stórtinginum ikki góðtaka. Samstundis hevur Jan Petersen, uttanríkisráðharri sagt tað beint øvugta.

Á einum loyniligum fundi í uttanríkisnevndini týsdagin fekk Bondevik at vita, at orð hansara hava ørkymlað bæði norðmenn og fólk í øðrum londum. Nevndin gjørdi greitt, at ger ST eina nýggja samtykt um Irak, er Noreg bundið at fylgja henni. Tað skal forsætisráðharrin eisini gera.

ítróttur
Nr. 25 • hósdagur • 6. februar 2003 • 77. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fleiri danskir leikarar á veg til Føroya

**Frank Skytte heldur, at danskir fótbóltsleikarar eru kræsnir og spiltir, men teir fara at vakna við kaldan dreym, og kanna sær møguleikan fyri at spæla í Føroyum**

FÓTBÓLTUR
*Páll Holm Johannesen*



*HB-venjarin skírir danskar fótbóltsleikarar fyri at vera kræsnar og spiltar, og hann væntar, at innan ikki alt ov langa tíð, fara fleiri danskir leikarar at venda sær til føroysk feløg.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

HB-venjarin, Frank Skytte, er ikki í iva um, at innan ikki ov langa tíð fara danskir fótbóltsleikarar at vakna við kaldan dreym. HB-venjarin hevur verið í Danmark í vetur, og hansara fatan er, at danskir leikarar slettis hava ikki skilt støðuna á fótbóltsmarknaðinum í løtuni.

### -Mín fatan er, at

Tað er ein sannroynd, at fíggjarviðurskiftini hjá flestu feløgum í Evropa ikki eru av teimum bestu, og tað hevur havt við sær at nógvir fótbóltsspælarar ganga arbeiðsleysir. Hetta er eisini støðan í Danmark, og tí skilir Frank Skytte ikki danskar fótbóltsspælarar. HB-venjarin heldur at danskir spælarar eru kræsnir og spiltir, men teir fara at vakna við kaldan dreym.

- Eg skilji ikki at arbeiðsleysu leikararnir ikki kanna støðuna at koma til Føroya at spæla. Teir fáa eitt arbeiðið, høvi at royna nakað nýtt og møguliga luttøku í evropeiskum fótbólti, sigur Frank Skytte opinskáraður

Frank Skytte vísir góðu úrslitini við Ulrik Balling, Nocko Jokovic og Anders Nygaard í fjør, og væntar at fleiri danir vera at síggja í føroyskum fótbólti í framtíðini.

- Støðan bara versnar á fótbóltsmarknaðinum, og fleiri og fleiri leikarar gerast arbeiðsleysir, og tí vænti eg, at fleiri danskar fótbóltsleikarar fara at royna í føroysku kappingini, um ikki eftir summarsteðgin í ár, so komandi kappingarár, sigur Frank Skytte at enda.

### Nógvir leigu sáttmálar

Ringa fíggjarstøðan hjá feløgum kring Evropa hevur havt við sær, at feløgini eru sera varin við at gera sáttmálar við leikarar, ið tey ikki kenna nóg væl.

Rákið seinasta árið vísir, at fleiri og fleiri leigusáttmálar vera gjørdir, har feløgini royna leikararnar í eitt hálvt ár, fyri síðani at hava møguleikan fyri at keypa leikaran. Dømi um hesa mannagongd hava vit í eitt nú okkara egna Jón Róa Jacobsen, sum hevur skrivað leigusáttmála við donsku meistarafelagið Brøndby til í summar.

# Føroyar Bjór verður høvuðsstuðul hjá HB

**Samstarvsavtalan prógvar, at gamla aggið millum Havnina og Klaksvíkina, hoyrir meira skemtinum til, segði Birgir Enghamar á tíðindafundinum, tá samstarvsavtalan millum Føroya Bjór og HB var undirskrivað týsdagin**

SAMSTARVSAVTALA
*Páll Holm Johannesen*

Sum væntað skrivaðu bryggjaríð í Klaksvík, Føroya Bjór, og HB undir samstarvsavtalu seinnapartin týsdagin. Avtalan inniber, at Føroya Bjór gert høvuðsstuðul hjá 1.liði hjá HB komandi tvey árini.

Á tíðindafundinum fegnaðist formaðurin í HB, Birgir Enghamar, um, at avtalan var komin undir land. - Vit er sera takksom og glað í HB fyri nýggja høvuðsstuðulin hjá felagnum, segði formaðurin á tíðindafundinum.

Birgir Enghamar legði afturat, at samstarvsavtalan var prógv um, at gamla aggið millum Havnina og Klaksvík hoyrdi meira skemtinum til, enn álvara. Birgir Enghamar lovaði Føroya Bjór, at felagið fór at gera alt fyri at marknaðarføra fyritøkuni so væl sum gjørligt komandi tvey árini.

Einar Waag, stjóri á Føroya Bjór, fegnaðist eisini um samstarvsavtaluna. Hann segði, at Føroya Bjór og HB altíð hava havt gott samstarv, og vónaði at tað framhaldandi fór at vera so í framtíðini.

- Vit hava stuðlað HB í nøkur ár, og tá møguleikin nú var fyri at gerast høvuðsstuðul, valdu vit at taka av. Vit meta avtaluna vera ein góðan møguleika fyri Føroya Bjór, segði Einar Waag í viðmerking á tíðindafundinum.

### Fleiri stuðlar

HB fer í ár at hava fleiri stuðlar til 1.lið felagsins. Felagið hevur farnu árini bert havt Føroya Banka sum sjónligan stuðul á troyggju og brókum. Umframt Føroya Bjór á troyggjuni, vera smærri lýsingar við Eimskip, Shell og Føroya Banka og Puma at síggja á troyggju og brókum hjá 1.liði hjá HB í ár.




*HB og Føroya Bjór skrivaðu sum væntað undir samstarvsavtalu týsdagin, og Birgir Enghamar lovaði at marknaðarføra Føroya Bjór á bestan hátt komandi tvey árini*
*Mynd: Jens Kristian Vang*